UTTAN ÚR HEIMI

## Vindur hóttir ferjusigling

Tað hevur verið rættiliga fitt av vindi í Danmark ta seinastu tíðina, og tað hevur fingið reiðaríið Saga Line at ivast í, um tað yvirhøvur loysir seg at sigla við ferðafólki tvørtur um Skagerak.

Fyrr í vikuni noyddist ein av ferjunum hjá reiðarínum at venda aftur til Noregs, tí veðrið var so vánaligt. Skiparin á "Sagafjord", Gunnar Utgård, sigur við Moss Avis, at leiðin ímillum Hirtshals og Skagen er sera veðurring. Hann fýlist eisini á, at veðurtíðindini eru ikki nóg neyv. Gunnar Utgård sigur, at tá teir mánadagin gjørdu av at venda aftur, var stormur í hvirlunum, sjálvt um veðurmenninir bara høvdu boðað frá strúki í vindi.

Sambært Moss Avis kann tað ólagaliga veðrið í Skagerak hava við sær, at siglingin hjá "Sagafjord" verður niðurløgd.

## Einki trúarfrælsi

Amerikonsku myndugleikarnir plaga at vanda sær væl um orðini, tá teir finnast at viðurskiftunum í Saudiarabia, men ein nýggj frágreiðing bendir á, at orðalagið er vorðið hvassari nú.

Frágreiðingina hevur uttanríkisráðið í Washington skrivað, og har stendur millim annað, at als einki trúarfrælsi er í Saudiarabia. Samstundis er kongadømið komið á ein lista við londum, sum sambært amerikanarunum elva til stúran. Eygleiðarar í Washington siga við Reuters, at tá USA kemur hevur so hvassar atfinningar at einum landi, heimilar lógin stjórnini at seta handilstiltøk í verk ímóti landinum, men at tað kortini neyvan verður gjørt í hesum føri.

Ein embætismaður í uttanríkisráðnum sigur við tíðindastovuna, at atfinningin er ein ávaring til teir saudiarabisku myndugleikarnar um, at teir mugu gera okkurt við tað vantandi trúarfrælsið, og at USA ætlar sær at taka málið upp.

## Laksamenn fáa endurgjald

Danska stjórnin hevur gjørt av, at fiskimenn á Bornholm og Christiansø skulu fáa endurgjald, tí teir sleppa ikki at selja tann stóra laksin til matna orsakað av vandanum fyri dioxin-dálking.

Sambært avgerðini hjá stjórnini skulu 70 fiskimenn fáa umleið tríggjar milliónir krónur í endurgjaldi, men tilsøgnin er treytað av, at ES góðkennir hana, tí ES skal gjalda helmingin.

Formaðurin í fiskimannafelagnum á Bornholm og Christiansø, Birger Rasmussen, er væl nøgdur við avgerðina hjá stjórnini. Hann sigur við Ritzau, at endurgjaldið svarar ikki til allan missin hjá fiskimonnunum, men at tað kortini er nøktandi.

## Skuldsettur fyri morð

Ein sjómaður úr Filipsoyggjunum er skuldsettur fyri at hava myrt ein av manningini á norska farmaskipinum "Tekay Fair", tá skipið var statt úti fyri indisku strondini í summar. "Tekay Fair" er 45.000 tons til støddar, og manningin er úr Spania og Filipsoyggjunum.

Norska løgreglan sigur, at ein 39 ára gamal filipsoyingur varð funnin deyður umborð á "Tekay Fair" um morgunin tann 11. juni. Hann hevði sitið í messuni um náttina saman við tveimum landsmonnum. Teir komu til ilnar um eitt ella annað, og sambært løgregluni tók annar av hinum monnunum ein knív og stakk tann 39 ára gamla so meint, at hann doyði stutt eftir. Løgreglan sigur, at hon heldur seg til frágreiðingina hjá tí triðja manninum.

Tann skuldsetti, sum er 25 ára gamal, hevur sitið í varðhaldi í Noregi síðani í juli, men hann heldur uppá, at hann er ósekur.

# Ósemja kann kosta Kerry valsigurin

**Tey, sum skipa fyri valstríðnum hjá John Kerry, klandrast heldur enn at samstarva, og tað kann hava við sær, at Bush vinnur greiðan sigur**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*John Kerry. Innanhýsis klandur í valbólki hansara kann kosta honum valsigurin í november*

– Tað er eingin, sum stýrir valstríðnum, og fólk ganga í bólkum og tosa ikki við hvør annan. Tað gongur ikki, sigur Tony Coelho. Hann er demokratur, og tað var hann, sum stóð á odda fyri valstríðnum hjá Al Gore fyri fýra árum síðani.

Við CBS sigur Coelho, at tey, sum leggja valstríðið hjá Kerry ganga í tveimum bólkum. Øðrumegin eru tey, sum hava arbeitt saman við Kerry í fleiri ár, og hinumegin eru fólk, sum arbeiddu saman við Bill Clinton. Ovastu leiðsluna hevur Mary Beth Cahill, og sambært CBS skal Kerry hava umhugsað at koyra hana úr starvinum fyri at venda gongdini.

Eygleiðarar í Washington siga, at tað eru fleiri orsøkir til, at George W. Bush er farin langt fram um Kerry í teimum seinastu kanningunum. Í fyrsta lagi hevur Kerry ikki megnað at sannføra amerikanararnar um, hvønn politikk hann veruliga ætlar sær at reka, verður hann forseti. Í øðrum lagi hevur Bush megnað at vísa fólki, at hann er tann rætti leiðarin í truplum tíðum, og í triðja lagi drálaði Kerry alt ov leingi við at vísa aftur tí, sum fyrrverandi hermenn søgdu um avrik hansara í Vietnam-krígnum.

Men enn ber ikki til at siga, at Bush fer at vinna. Christopher Malone á lærda háskúilanum PACE í New York sigur, at demokratarnir kunnu framvegis vinna valið í november.

– Eingin skal undirmeta Kerry. Hann er ein stríðsmaður, sum altíð er førur fyri at reisa seg aftur. harafturat eru veljarakanningarnar ikki altíð eftirfarandi, sigur Malone við CBS.

Kanska er nakað í hesum. Í hvussu er vísti ein veljarakanning í gjár, at nógvir veljarar, sum hava ivast, hava gjørt av at velja John Kerry. Fyri einum mánað síðani søgdu 56 prosent av teimum, sum ivaðust, at tey helst fóru at velja Bush, tá saman um kom, men í dag eru tað bert 44 prosent, sum siga tað. Samstundis siga 43 prosent, at tey ætla sær at velja Kerry. Fyri einum mánað síðani vóru tað bara 36 prosent, sum væntaðu, at tey fóru at geva Kerry krossin.

# Afrika fingið felags ting

**Tað var ein søguligur dagur í gjár, tá tað afrikanska eindartingið setti sín fyrsta fund**

AFRIKA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Í gjár hittust 230 umboð fyri 46 afrikonsk lond til fundar í Johannesburg í Suðurafrika, og harvið fór tað afrikanska eindartikið undir sína fyrstu setu.

Tað var fyri tveimum árum síðani, at londini í Afrika samtyktu at stovna eitt felags ting, sum skal virka fyri at loysa teir nógvu trupulleikarnar, sum heimsparturin hevur at dragast við. Tey fyrstu fimm árini eru samtyktirnar hjá tinginum bara vegleiðandi, men tá tey árini eru farin, skulu londini taka støðu til, um samtyktirnar skulu vera bindandi.

Tað eru ikki øll, sum vænta sær so nógv av nýggja tinginum, men tey flestu vænta kortini, at tingið verður gagnligt fyri Afrika. Ein teirra er suðurafrikanski varauttanríkisráðharrin, Sue van der Merwe.

– Tingið er avgjørt eitt framstig fyri demokratiið í okkara heimsparti, sigur hon við Aftenposten.

Fleiri hava fýlst á, at tingið hevur fingið sæti í Suðurafrika, tí nógvastaðni uppfata fólk landið sum eitt afrikanskt stórveldi. Egyptaland og Libya buðu sær eisini til at hýsa tinginum, men tá tey tóku síni tilboð aftur, var bara Suðurafrika eftir.

Gertrude Mongela, sum í fleiri ár hevur starvast hjá heimsheilsustovninum WHO, verður fyrsti formaður í afrikanska tinginum. Tingið hevur tvær setur um árið, og tað er mannað við fimm umboðum úr hvørjum landi uttan mun til stødd ella fólkatal.



# Nýggjur íslendskur forsætisráðharri

**Ísland fekk nýggjan forsætisráðharra mikudagin. Tá tók Halldór Ásgrímsson, uttanríkisráðharri, við eftir Davíð Oddson, sum nú er uttanríkisráharri**

RÁÐHARRASKIFTI
*Edvard Joensen*



*Halldór Ásgrímsson, h.m., hevur júst fingið lykilin til forsætismálaráðið frá Davíði Oddssyni*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Reykajvík:** Eftir at hava sitið í íslendska forsætisráðharrastólinum í 13 ár, lat Davíð Oddson mikudagin sætið til uttanríksráðharra sín, Halldór Ásgrímsson. Teir skiftu um starv, soleiðis at Davíð Oddsson nú er uttanríkisráðharri.

Sjálvstæðismaðurin Davíð Oddsson hevur verið íslendskur forsætisráðharri í 13 ár, og nógv teirra, sum starvast í forsætismálaráðnum, kenna ikki til annað enn, at hann situr í stólinum í vestara enda í lítlu, gomlu húsunum við Lækjargatu. Men frá hálvum september í ár verður tað so framsóknarmaðurin Halldór Ásgrímsson, sum fer at røkja hetta starvið.

Halldór Ásgímsson er royndur politikari. Hann hevur samanlagt verið tingmaður í 29 ár, og ráðharri hevur hann verið í 17 ár. Umframt at hava verið uttanríkisráðharri, hevur hann millum annað eisini verið fiskimálaráðharri í Íslandi.

Davíð Oddsson var í eitt áramál borgarstjóri í Reykjavík, áðrenn hann fór upp í landspolitikk og gjørdist forsætisráðharri Íslands. Tað var hann, sum var vertur, tá Ronald Reagan og Michail Gorbatjov í 1985 hildu fund í móttøkuhúsunum Høfða í Reykajvík.



*Halldór Ásgrímsson hevur sett seg í forsætisráharrasessin, sum Davíð Oddson hevur sitið í seinatu 13 árini*
*Mynd - Edvard Joensen*

Forsætisráðharraskiftið í Íslandi mikudagin er liður í avtalu, sum gjørd varð eftir valið seinast. Samstundis varð eisini umhvørvismálaráðharrin skiftur út.

Tað er alment kent, at heilsustøða Davíð Oddssonar hevur verið heldur vánalig seinnu tíðina, og hann hevur fingið fleiri persónligar heilsanir hesar dagarnar undan ráðharraskiftinum, vistu starvsfólk í forsætismálaráðnum at siga frá mikudagin. Millum annað var heilsa komin frá amerikanska forsetanum Geroge Bush og frá fyrrverandi forsetafrúuni Hillary Clinton við ynski um góðan betring.

Tað sama ynskti nýggi íslendski forsætisráðharrin, Halldor Ásgrímsson, eisini udnanmanni sínum, tá hann mikudagin fekk lykilin til forsætismálaráðið frá Davíði Oddsyni.

Íslendski forsætisráðharrin heldur til í einum lítlum húsum frá 1756, sum standa í miðbýnum í Reykjavík. Beint niðan fyri íslendsku operuna. Tá sagt verður lítlum húsum, skal tað skiljast bókstaviligt. Til smanbering kann sigast, at løgmansskrivstovan í Tinganesi man hava umleið tað dupulta av húsarúmd.

Saman við forsætis- og uttanríkisráðharrunum fluttu eisini summi av ovastu starvsfólkunum við ráðharrum sínum í nýggja ráðstovu mikudagin.



*Uttan sær íslendska forsætismálaráðið ikki út av nøgvum*
*Mynd: Edvard Joensen*

## Kórið hjá Jóhan byrjar aftur

**Leygardagin 18. september byrja kórvenjingarnar hjá blandaða kórinum hjá Jóhan Mortensen aftur**

KÓR
*tíðindaskriv*

Eins og undanfarnu árini er stevnumiðið at hava eina jólakonsert í Fríðrikskirkjuni. Helst verður tíð til at taka okkurt annað tilfar ígjøgnum eisini, so kórið kann bjóða seg fram í mentanarligum høpi.

Fyrsta venjingin verður nú leygardagin í skúlanum í Runavík frá klokkan 15:00 til 17:30. Eydnast tað at manna kórið, verður hildið fram við venjningunum annanhvønn leygardag.

Kring landið er mangan torført at fáa kórini mannað, og tí er tað sjálvsagt, at nýggir sangarar eru vælkomnir upp í kórið.

## DJ-show og karaoke í Fuglafirði

**Leygarkvøldið verður DJ-show og karaoke í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

DJ-SHOW
*Tíðindaskriv*

Nógvar nýggjar karaoke fløgur eru júst heimkomnar við løgum so sum »This love« hjá Maroon 5 v.m. og hvør hevur ikki tralla við tá ið »Summernigths« úr Grease hevur ljóma út úr hátalarunum. Nú eru fleiri hundraðtals løg at velja ímillum.

Hesaferð verður tað Jákup Jacobsen sum verður frásøgufólk. Mark verður DJ. Teir báðir eru kendir fyri at seta rættligt lív í. Teir siga í tíðindaskrivinum, at fleiri nokk skulu sleppa framat at syngja enn seinast.

Tiltakið verður í Mentanarhúsinum leygarkvøldið tann 18.sep. kl. 23:30-03:30.

## Skótahjálpin 20 ár

**Hjálpararbeiði millum børn í Kolumbiu**

SKÓTAHJÁLPIN
*tíðindaskriv*

Kolumbia er land í Miðameriku, sum í mong ár er herjað av borgarakríggi og umfatandi korruptión innan almennu myndugleikarnar. Nøkur fá eru sera rík, men fjøldin livir í armóð.

Í vár komu vit í samband við Tito biskup úr Kolumbiu, sum er ST-flótti í Noregi, tí hann er hóttur eftir lívinum vegna sítt arbeiði fyri neyðstødd í heimlandinum. Saman við hjálparum hevur hann stovnað barnaheim fyri børn hjá familjum, sum ofta eru flýdd frá lítla garði sínum, tí narko-harkalið hava tikið hann til sína óhugnaligu framleiðslu. Mangan er talan um einligar møður við stórum barnaflokki, tí pápin er myrdur.

Á barnaheiminum fáa tey mat, klæði og skúlagongd. Roynt verður at læra tey at fyrigeva teimum, sum hava elvt teimum neyðina, heldur enn at hata. Við góðari útbúgving kunnu tey gerast framtíðar leiðarar í landinum og fáa tað aftur á føtur.

Fyri eina krónu um dagin kann ein familja við 10 børnum verða mettað.

Skótahjálpin hevur í ár gjørt av at lata útlendsku verkætlanina vera at stuðla arbeiðinum hjá Tito Jesus Mora Esquerra, biskupi.

Meira fast at vita á www.colombiaprosjektet.com



*Skúlin í San Vicente læt upp 21. apríl 2003*